

*fyrst var byrjað við tunnusláing og síðani dansaðu tey til "Jákup og Jørgen inni í Húsmøðrafelagshúsinum.*

# Sørvági



*"Lucky lips" og aðrir slagarir vóru á skránni.*



*Tunna var sligin bæði úti og inni.*

# Skapandi verkhús

**Tøvdar taskur, bundnar húgvur og seymaðir jakkar liggja á hyllinum inni í Verkhúsinum í Sørvági. Tað er leiðarin Susan Tavsen, sum saman við starvsfólkunum ger hesar lutir, sum síðani verða seldir fyri ein bíligan penga**



*Susan Tavsen er leiðari í Verkhúsinum.*

VERKHÚS

*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Verkhúsið í Sørvági er tað nýggjasta verkhúsið í Føroyum, tað hevur bara eitt og eitt hálvt ár á baki. Áðrenn hølið var til taks varð hildið til í skúlanum í Sørvági.

Sum tað er nú, eru tað átta starvsfólk sum arbeiða á verkhúsinum. Susan Tavsen er leiðari og hevur eitt fólk aftrat sær í hálva tíð.

Verkhúsið er til fyri tey menningartarnaðu, og øll millum 18-67 eru vælkomin at arbeiða har. Tey sum koma til verkhúsið í Sørvági búgva øll heima.

– Vit hjálpa teimum við forarbeiðinum og avslutninginum av tingunum, alt harímillum gera tey sjálvi, sigur Susan Tausen.

Lutirnir líkjast nógv tí, vit síggja í vanligum klædna- og møblahandlum, men her eru lutirnir hondgjørdir.

– Vit binda við við maskinu og tøva, og so tøva vit eisini ull, seyma og fáast við decoupage, sigur Susan.

Tey menningartarnaðu sum arbeiða í verkhúsinum fáa onga beinleiðis løn eftirsum tey fáa pensión. Tí er heldur ongin møtiskylda hjá teimum.

Men um ein skal døma av úrslitinum, so sær út sum verkhúsið í Sørvági hevur nógv virksemið.



*Nógvir nýmótans lutir verða gjørdir á Verkhúsinum.*



